# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

# Eyga fyri eyga...



*15 fólk doyðu, tá fleiri Hizbollah-rakettir raktu Haifa í gjárkvøldið. Her verður ein særdur maður fluttur á sjúkrahús*

*Mynd: Reuters*

Ísraelsk flogfør hevndu í morgun Hizbollah-álopið á Haifa í gjárkvøldið.

Ísraelsku flogførini bumbaðu fleiri mál í tveimum bygdum har suðuri í Libanon. Libansku myndugleikarnir søgdu, at í aðrari bygdini doyðu minst sjey fólk, og fýra vórðu særd. Í hinari bygdini kostaðu ísraelsku loftálopini fýra mannalív.

Álopið var helst hevnd fyri rakettálopið hjá Hizbollah á ísraelska býin Haifa í gjárkvøldið, har 15 fólk lótu lív. Ísraelska herleiðslan segði stutt eftir álopið á Haifa, at rakettirnar hjá Hizbollah komu úr sivilum økjum í Suðurlibanon, og at tað tí ikki slepst undan, at sivilfólk doyggja í teimum ísraelsku álopunum.

Sambært fronsku tíðindastovuni AFP vóru harðir bardagar millum ísraelskar hermenn og Hizbollah í morgun. Arabiska sjónvarpið Al Arabyia segði fyrrapartin, at minst fýra ísraelskir hermenn vóru deyðir í bardøgunum í morgun, men tíðindini eru ikki váttað.

Meðan bardagarnir halda fram, verður roynt at loysa kreppuna á diplomatiskan hátt. Uttanríkisráðharrarnir í fleiri arabiskum londum eru komnir til Beirut at viðgera støðuna og at tingast um, hvat kann gerast. Hinvegin eydnaðist tað ikki trygdarráðnum hjá ST at semjast um yvirlýsingina, sum USA og Frakland høvdu orðað. Høvuðsorsøkin var, at Libanon alment kunngjørdi, at landið kundi ikki góðtaka innihaldið í teirri ætlaðu yvirlýsingini.

### Sýrialand kann leggja uppí

Fyri fyrstu ferð síðani sýrisku afturtøkuna úr Libanon í fjør var sýriski uttanríkisráðharrin, Walid al-Moallem, í gjár í Libanon. Ørindini vóru at tosa við umboð fyri libansku stjórnina og tjóðartingið um støðuna, og á tíðindafundi aftaná gjørdi al-Moallem greitt, at Sýrialand fer ikki at sita hendur í favn, halda ísraelsmenn fram við álopunum á mál í Libanon.

- Vit eru til reiðar, skuldi tað hent, at kreppan versnar, segði uttanríkisráðharrin við tíðindafólkini.

Hann legði afturat, at Sýrialand kann ikki góðtaka ta ætlaðu yvirlýsingina hjá ST-trygdarráðnum, tí hon gongur Ísrael á møti í alt ov stóran mun, og tí hon sambært sýrisku stjórnini gevur Ísrael høvi til at halda fram við álopunum á Libanon.

Hizbollah fær dygga undirtøku í Sýrialandi, og eygleiðarar hava leingi sagt seg stúra fyri, at tey ísraelsku álopini í Suðurlibanon kunnu draga Sýrialand upp í bardagarnar.

# Vænta stórt gos

Myndugleikarnir í Filipsoyggjunum ætla at flyta fleiri túsund fólk burtur frá einum gosfjalli.

Einki gosfjall í Filipsoyggjunum er so virkið sum Mayon, sum er miðskeiðis í landinum.

Nú hóttir fjallið aftur við at gera vart við seg, og jarðfrøðistovnurin í Manila sigur, at talan kann gerast um eitt gos av teimum stóru. Tað hevur fingið myndugleikarnar at seta í verk eina tilbúgvingarskipan, sum millum annað ber í sær, at tey, sum búgva minni enn átta kilometrar frá fjallinum, skulu flytast burtur haðani. Sambært Reuters snýr tað seg um eini 60.000 fólk.

Tey seinastu 400 árini hevur Mayon goyst 50 ferðir. Tað ringasta gosið var í 1814, tá meiri enn 1.200 fólk doyðu.

## STUTT SAGT

### Fiskasløg hvørva úr Norðsjónum

Kanningar, sum norska havrannsóknarskipið ”Johan Hiorth” hevur gjørt, vísa, at fiskasløg sum toskur, hýsa og sild eru um at hvørva úr Norðsjónum, tí føðin hjá hesum fiskasløgunum svíkir, sigur norska útvarpið NRK.

Í Norðsjónum liva toskur og onnur fiskasløg fyri tað mesta av tobis, men hesin stovnurin er minkaður burtur í einki tey seinastu árini. Fiskifrøðingarnir høvdu vónað at finna ein góðan árgang av tobis nú, men uttan úrslit. Tvørturímóti vísir tað seg, at tobisstovnurin er minkaður heili 90 prosent í Norðsjónum, sigur fiskifrøðingurin Tore Johannessen við NRK. Hann sigur, at gongdin hjá tobisstovninum er ein týðilig ábending um, at øll tey vanligu fiskasløgini í Norðsjónum hava ilt við at endurnýggja seg.

Tore Johannesen ivast ikki í, at tann stóra afturgongdin hjá tobisstovninum kemst av umfatandi dálking í Norðsjónum. Tað ávirkar ikki bara fiskastovnarnar, men eisini sjófuglin, sum er minkaður nógv tey seinastu árini.

### Stúrir ikki fyri borgarakríggi



Amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, heldur ikki, at ófriðurin í Irak fer at enda við borgarakríggi millum shiamuslimar og sunnimuslimar.

Í síðstu viku søgdu tveir av teimum ovastu amerikonsku generalunum, at tað er stórur vandi fyri borgarakríggi í Irak, og tað sama søgdu tveir amerikanskir senatorar aftan á eina mótmælisgongu í Bagdad, har fólk mótmæltu útlendska hervaldinum og brendu amerikanska flaggið.

Condoleezza Rice viðgekk í gjár, at henni hóvaði ikki tað, sum hendi undir mótmælisgonguni, men hon helt fast um, at eftir hennara tykki er eingin vandi fyri borgarakríggi í Irak. Hon helt heldur ikki, at Iran er ført fyri at elva til borgarakríggj í grannalandinum, og at stjórnin í Bagdad er før fyri at forða fyri borgarakríggi millum shiamuslimar og sunnimuslimar.

### Roykjarar skiljast frá

ES-nevndin hevur samtykt eina kunngerð, sum gevur arbeiðsgevarum loyvi at vraka starvsumsóknir frá fólki við teirri grundgeving, at tey roykja. Tað ber í sær, at í framtíðini kunnu fyritøkur søkja eftir fólki, sum ikki roykja, samstundis sum tær kunnu gera vart við, at umsóknir frá roykjarum verða ikki viðgjørdar, skrivar Berlingske Tidende.

Upprunaliga varð kunngerðin gjørd tíðliga í summar, men ein bretskur limur í ES-tinginum mótmælti, tí hann vildi ikki góðtaka eina lýsing hjá einum írskum arbeiðsgevara, sum søkti eftir ”roykfríum” medarbeiðarum. Men tað hevði arbeiðsgevarin loyvi til, sigur Vladimir Spidla, sum er ES-kommiserur í arbeiðsmarknaðarmálum. Hann vísir í svari sínum á, at ES-reglurnar eru greiðar, tá tað snýr seg um at gera mun á fólki, men at hesar reglur umfata ikki royking.

Írski arbeiðsgevarin, sum søkti eftir ”roykfríum” medarbeiðarum, sigur við bretska blaðið Financial Times, at roykjarar hava fingið so nógvar ávaringar um, hvussu vandamikið tað er at roykja, at hava tey ikki skil fyri at leggja av, eru tey heldur ikki egnað til at arbeiðs hjá fyritøkuni.